*Lagt til rættis: Rigmor Dam*

# Barnatos



## Barnatekningar á lørift

Barnatekningar liva ofta eina stokkuta tilveru. Í besta føri prýða tær køliskápshurðina í nakrar dagar, í ringasta, og sum oftast, enda tær dagar sínar í einum stakki, saman við øðrum fínum tekningum, við einum "áh, sum tú dugur væl, góða.." Hetta er stórt spell, tí nógvar barnatekningar eru sonn listaverk á at líta, spontanar, fantasifullar og erligar. Listakvinnan Rikke Schultz bjóðar at mála barnatekningar yvir á lørift, so tú kanst prýða heimið við teimum og njóta tær í mong ár framyvir. Vit halda hugskotið vera avbera gott, og hvør sigur, at tað skal vera júst hendan listakvinnan, sum ger arbeiðið? Kanska skuldi vit roynt sjálvar. Í øllum førum verða børnini ovurfegin, tá ið tey síggja fínu tekningarnar sum rættiligir "vaksnamálningar" í stovuni. www.ditbarnsmaleri.dk

## Barnavinarligur fepurstokkur

**Nú er nógv lættari at máta fepurin hjá lítla barninum. Hendan smarta suttan er til børn upp til 3 ár. Rætti hitin kemur fram innan 5 minuttir. Kostnaður umleið 175 krónur.**




## Sálarfrøðingurin

# Barnið ynskir sær teg

**Tú livir kanska í 90 ár. Brúka 10 av teimum til at geva barninum ein góðan barndóm. Tú skalt ikki náa alt, áðrenn tú verður 40**

Tað loysir seg altíð í síðsta enda, at brúka tíð upp á smábørnini. Hetta sigur Margrethe Brun Hansen, sálarfrøðingur, sum var limur donsku Chance for Balance kommisjónini, sum skrivaði álit um, hvussu vit fáa betri javnvág millum arbeiðs- og familjulív. Margrethe hevur eina greiða meining um, hvussu børnini fáa betri rúmd í einum stressaðum gerandisdegi hjá familjuni.
Hon sigur, at tað hevur stórar broytingar við sær at gerast foreldur. Fyri framman stendur eitt umsorganararbeiði, sum vekir kenslur sum angist, skuld og vreiði, men sanniliga eisini kenslur av eydnu og ríkidømi.

- Fyrireika teg til, at tú hevur eitt lív áðrenn tú fært børn, og eitt annað lív, tá tú hevur fingið børn. Um tú góðtekur og lagar teg til hetta, fært tú betri javnvág í tilveruna. Tú livir kanska í 90 ár, brúka 10 av teimum til at geva barni tínum ein góðan barndóm, sigur sálarfrøðingurin, sum eisini er høvundin aftanfyri vælumtóktu bókina De kompetente forældre.

### Kærleiki og orka geva úrslit

Hon hevur nøkur ítøkilig ráð til, hvussu tað eydnast at geva barninum ein góðan barndóm:
- Gev barninum eina kenslu av, at tú elskar, sært og skilur tað. So verður barnið eisini ført fyri at klára seg og at vera til gleði og gagn hjá øðrum og samfelagnum sum heild.

Legg orkuna í barnið nú, tí tað kann ikki bíða. Tað fær stórar avleiðingar, um tú, tá barnið til dømis er 16 ár, noyðist at viðganga, at tit eru fremmand fyri hvørjum øðrum, og barnið kanska ikki hevur hug til at hava sambond við onnur. Tá er tað ov seint, sigur hon.

### At velja til og frá

Margrethe Brun Hansen, sálarfrøðingur, sigur eisini, at tú skalt ikki náa alt, áðrenn tú verður 40. Lívið aftaná tey 40 eru árini við møguleikum, og tú hevur nú eini 25 fantastisk ár fyri framman til at fremja og røkka málunum.
- Minst til, at tað, sum tú sáar av kærleika, nærleika, virðum og dannilsi, tá ið barnið er lítið, kanst tú heysta á ellisárum.

Tá ið fólk alla tíðina kenna soleiðis at tey fara ov tíðliga frá arbeiði um dagarnar og komi ov seint heim til børnini, so snýr tað seg um at loysa hesa tvístøðuna við at taka nakrar prinsipiellar avgerðir í samráð við familjuna og arbeiðsplássið. Og ikki minst: at halda fast, staðfestir sálarfrøðingurin. Og hon skoytir uppí, at tá ið tú velur til, velur tú eisini frá.

- Tað kann vera, at tú í eitt styttri tíðarskeið noyðist at velja karrieruna frá – og børn og hjúnafelaga til. Ella tú heilt velur børn og hjúnafelaga frá í lívinum, tí tú metir karrieruna hava størstan týdning. Tað kann vera sera ábyrgdarfult, at velja børn frá, tí man stutt og greitt metir, at tað at vera foreldur ikki kann sameinast við tað lívið, sum man kundi hugsað sær.

### Ver sum barnið

Sálarfrøðingurin biður okkum minnast til í familjuni at viðurkenna menniskjaligu eginleikarnar fram um ítøkilig avrik. Fólk sum kenna á sær at tey verða sæð, lisin og skilt, hava í minni mun lyndi til at leita sær viðurkenning gjøgnum arbeiðið.
- Royn av og á at liva sum barnið: í nú'inum. At gloyma teg sjálva/n burtur og at vera til staðar. Uppliva veruliga gleði, og bíða ikki við tilrættisløgdu gleðina til fríggjakvøldið. Sparka handan bóltin og droym at tú ert Ronaldinho...

